

# Frítíðargrunnurin farin til verka

**STUÐUL Fyrstu umsóknirnar eru játtaðar úr Frítíðargrunninum, sum nú alment er farin til verka. Í fyrstu syftur arbeiðir grunnurin við einum játtanarkarmi á eina millión krónur**

Leo Poulsen

Fæið í grunninum eru 18 milliónir krónur, ið stava frá frítíðarløn, sum ikki verður gjørt krav upp á, umframt rentuinntøkur. Nú verða hesar aktiveraðar.

Líka síðani lógin um frítíðarløn varð broytt í 1986, hevur ein konta staðið og rentað og vaksið. Deils við frítíðarløn, ið krav ikki er gjørt upp á, deils við rentuinntøkum.

Frítíðarlønin kann vera frá útlendingum, sum arbeiða í Føroyum eitt tíðarskeið, og sum antin ikki vita, at teir eiga frítíðarløn, ella ikki tíma at fáast við at gera krav upp á hana, sigur Johan Dahl, avvarandi landsstýrismaður.

Reglugerð er gjørd fyri frítíðargrunnin, og nevnd er vald. Bjartur Dalsgarð er formaður í nevndini og hann sigur, at tað í høvuðsheitinum eru sjálvsognarstovnar og felagsskapir, sum kunnu søkja úr grunninum.

Einstaklingar, partafeløg, kommunur og líknandi kunnu sostatt ikki søkja úr grunninum, tó kunnu eindir í kommunum søkja, sigur Bjartur Dalsgarð.

Fæið í grunninum er í løtuni 18 milliónir krónur, og nevndin hevur í høvuðsheitinum tríggjar uppgávur. Sum nummar eitt at lata stuðul úr grunninum, men hartil skal nevndin eisini fíggja umsitingina, umframt at konsolidera grunsfæið.

Í løtuni er rentan ógvuliga lág, og tí er stuðulsupphæddin á einari millión krónum. Vit vóna og vænta tó, at upphæddin aftur fer at koma upp á upprunaligu 1,5 milliónir krónur, sigur Bjartur Dalsgarð.

Á tíðindafundinum vórðu nevnd dømir upp á verkætlanir og felagsskapir, ið kunnu søkja stuðul úr grunninum:

- Toftavatn
- Gjógvará í Vestmanna
- KFUM, Virkisdepilin á Selatrað
- Stígum fast, dansistevna
- Húsini í Beitinum
- Porkeris bygdarsavn
- Gjómaður
- Grindabátafelagið í Vági

Nevnt varð, at eitt nút Toftavatn hevði fingið stuðul til ljós fram við gongugøtuni niðan á Toftavatn, Stígum fast hevði fingið stuðul til dansistevnuna og Grindabátafelagið í Vági hevði fingið stuðul til ein vogn at draga bátarnar upp við.

Frítíðargrunnurin hevur gjørt faldarar, ið greiða frá endamáli grunsins og hvør kann søkja úr grunninum. Eisini ber til at fara inn á heimasíðu grunsins: fritidargrunnurin.fo

*leo@sosialurin.fo*

# Anna útbúgvin timburmaður



TIMBURMAÐUR

*Anna Reinert saman við pápanum og lærumeistaranum, Ólavi Reinert*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**ÚTBÚGVING Tað er ikki hvønn dag, at ein kvinna fær prógv sum timburmaður í Føroyum, men tað hendi í gjár, tá Anna Reinert fekk handað sítt prógv á Tekniska Skúla í Tórshavn**

Leo Poulsen

Tað gerst alt meiri vanligt, at kvinnur troðka seg inn á annars mansdomineráð øki. Fleiri kvinnur hava fingið prógv til dømis elektrikari, snikkari, málari og enntá skipari. Og eisini innan húsasmíð halda kvinnur seg framat.

Í gjár fekk Anna Reinert handað prógv sum húsasmiður á Tekniska Skúla í Tórshavn. Hetta er fyrstu ferð, at Tekniski Skúli í Tórshavn handar eini kvinnu prógv sum timburmaður. Men kortini ikki fyrstu ferð, at tað hendir í Føroyum.

Men hví hevur Anna valt at taka útbugving sum timburmaður?

– Eg arbeiddi hjá pápa mínum, sum er timburmeistari, og so kom tað rímiliga náttúrligt at fara í læru hjá honum, sigur Anna Reinert.

Tað sigur seg sjálvvt, at hon hevur verið rættiliga einsamøll kvinna í einari mansverð, men tað hevur ikki rættiliga nerva hana.

– Tað hevur verið ein avbjóðing, men eg haldi ikki, at tað hevur verið so galið. Vit hava komið væl út av tí saman, sigur núklækti timburmaðurin.

At pápin, Ólavur Reinert, er timburmeistari, hevur sjálvandi havt sína ávirkan á, at Anna fór í læru.

– Ja, tað hevur sjálvandi verið viðvirkandi til, at eg tók hesa avgerð, sigur hon.

Ofta er tosið í einari mansverð ikki hitt sama, sum á inari skrivstovu, og soleiðis hevur eisini verið fyri Annu.

– Sjálvandi tosaðu menninir sítt tos, og eg fekk okkurt skotið, men tað lærir man skjótt at liva við, sigur Anna Reinert.

Men sjálvt um hon nú hevur lokið útbúgving sum húsasmiður, verður hamarin ikki tað fyrsta, hon fer at taka í hond.

– Eg havi søkt inn sum byggiteknikari, so tað verður tann vegin, eg ætli mær, sigur Anna Reinert.

Hon er higartil onnur kvinnan, sum fær prógv sum timburmaður í Føroyum. Hin fyrsta var Margit Eltør, ið fók prógv sum timburmaður á Tekniska Skúla í Klaksvík í 1990.